**Løgtingsins Fíggjarnevnd**
LM-015/2025: Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2026 (broytt uppseting)

# Broytingaruppskot frá landsstýrinum til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2026 (broytt uppseting)

Fíggjarmálaráðið
2. desember 2025

# Høvuðsyvirlit

**Høvuðsyvirlit yvir broytingar til fíggjarlógaruppskotið** **2026**

| Túsund kr. | | Rakstrarætlan Útreiðslur | Rakstrarætlan Inntøkur | Løguætlan Útreiðslur |
|---|---|---|---|---|
| **§ 1.** | **Løgtingið** | **-** | **-** | **-** |
| | *10. Løgtingið* | - | - | - |
| **§ 2.** | **Løgmansfyrisiting** | **-5.116** | **-** | **-** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *-750* | - | - |
| | *12. Landsstýrið* | *-3.366* | - | - |
| | *13. Uttanríkismál* | - | - | - |
| | *14. Lógarmál* | - | - | - |
| | *38. Samferðsla og samskifti* | *-1.000* | - | - |
| **§ 3.** | **Fíggjarmál** | **1.668** | **-** | **-4.000** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *-160* | - | *--1.000* |
| | *13. Uttanríkismál* | - | - | - |
| | *14. Lógarmál* | - | - | - |
| | *15. Fíggjarmál o.a.* | *900* | - | *-1.000* |
| | *18. Almenn starvsfólk v.m.* | - | - | - |
| | *21. Almannamál* | - | - | - |
| | *22. Íbúðarmál* | - | - | - |
| | *37. Handil og vinna annars* | - | - | - |
| | *38. Samferðsla og samskifti* | *928* | - | *-2.000* |
| **§ 6.** | **Tilfeingis- og vinnumál** | **302** | **-** | **-** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *-1.070* | - | - |
| | *31. Tilbúgving* | - | - | - |
| | *32. Ráevnisvinna* | - | - | - |
| | *33. Landbúnaður* | *2.000* | - | - |
| | *34. Fiskivinna* | - | - | - |
| | *35. Sjóvinna* | *72* | - | - |
| | *36. Aling* | - | - | - |
| | *37. Handil og vinna annars* | *-700* | - | - |
| | *38. Samferðsla og samskifti* | - | - | - |
| **§ 7.** | **Barna- og utbúgvingarmál** | **3.650** | **-** | **-2.700** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *-950* | - | - |
| | *21. Almannamál* | - | - | - |
| | *23. Útbúgving og gransking* | *4.600* | - | *-2.700* |
| **§ 8.** | **Almanna- og heilsumál** | **-2.900** | **-** | **18.800** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *-950* | - | - |
| | *20. Heilsumál* | *-700* | - | *18.800* |
| | *21. Almannamál* | *-1.250* | - | - |
| | *39. Arbeiðsmarknaður* | - | - | - |
| **§ 13.** | **Uttanríkis- og mentamál** | **1.380** | **-** | **-4.000** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *5* | - | - |
| | *13. Uttanríkismál* | *1.500* | - | - |
| | *14. Lógarmál* | - | - | - |
| | *24. Mentan* | *175* | - | *-4.000* |
| | *30. Umhvørvi* | - | - | - |
| | *32. Ráevnisvinna* | - | - | - |
| | *33. Landbúnaður* | - | - | - |
| | *37. Handil og vinna annars* | *-300* | - | - |
| | *38. Samferðsla og samskifti* | - | - | - |
| **Tilsamans** | | **-1.016** | **-** | **8.100** |
| § 20. | 50. Rentur | - | - | - |
| § 20. | 52. Skattir og avgjøld | - | - | - |
| § 20. | 54. Ríkisstuðul | - | - | - |
| Tilsamans | | -1.016 | - | 8.100 |
| Yvirskot | | | 1.016 | - |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ I** | | **-** | **-7.084** | **-** |
| § 56. | 33. Landbúnaður | - | 2.000 | - |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ II** | | **-** | **-5.084** | **-** |

# TEKSTUR

## § 2 LØGMANSFYRISITINGIN

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr. | Nettotal | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -5.116 | -5.116 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **-750** | **-** |
| 2.11.1. Fyrisiting | | -750 | - |
| **Landsstýrið** | | **-3.366** | **-** |
| 2.12.3. Landsstýrið | | -3.366 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **-1.000** | **-** |
| 2.38.2. Samferðsla | | -1.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **2.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 2.11.1.02. Løgmansskrivstovan *(Rakstrarjáttan)* | U | 23.213 | - |
| | **BU** | **-750** | **-** |
| **2.12.3. Landsstýrið** | | | |
| 2.12.3.01. Løgmaður og landsstýri *(Rakstrarjáttan)* | U | 11.966 | - |
| | **BU** | **-3.366** | **-** |
| **2.38.2. Samferðsla** | | | |
| 2.38.2.28. Ferðsluveðhald til P/F Eystur- og Sandoyartunlar *(Stuðulsjáttan)* | U | 1.000 | - |
| | **BU** | **-1.000** | **-** |

# § 3 FÍGGJARMÁL

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr. | Nettotal | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 1.668 | 1.668 | - |
| Løguætlan | -4.000 | -3.000 | 1.000 |
| **Felagsútreiðslur** | | **-160** | **1.000** |
| 3.11.1. Fyrisiting | | -160 | 1.000 |
| **Fíggjarmál o.a.** | | **-100** | **-** |
| 3.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m. | | -1.000 | - |
| 3.15.2. Hagfrøði | | 900 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **-1.072** | **-** |
| 3.38.1. Vegir og havnir | | -2.072 | - |
| 3.38.2. Samferðsla | | 1.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **3.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 3.11.1.03. Fíggjarmálaráðið *(Rakstrarjáttan)* | U | 17.445 | - |
| | **BU** | **-160** | **-** |
| 3.11.1.58. Almennir bygningar, søla *(Løgujáttan)* | U | - | 13.000 |
| | **BU** | **-** | **1.000** |
| 3.11.1.62. Landsins ognir *(Løgujáttan)* | U | 4.000 | - |
| | **BU** | **-** | **-** |
| **3.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m.** | | | |
| 3.15.1.12. Nýggj skattaskipan *(Løgujáttan)* | U | 18.000 | - |
| | **BU** | **-1.000** | **-** |
| **3.15.2. Hagfrøði** | | | |
| 3.15.2.01. Hagstova Føroya *(Rakstrarjáttan)* | U | 16.544 | - |
| | **BU** | **900** | **-** |
| **3.38.1. Vegir og havnir** | | | |
| 3.38.1.02. Landsverk *(Rakstrarjáttan)* | U | 64.194 | - |
| | **BU** | **-72** | **-** |
| 3.38.1.07. Nýggir landsvegir *(Løgujáttan)* | U | 60.500 | 100 |
| | **BU** | **-2.000** | **-** |
| **3.38.2. Samferðsla** | | | |
| 3.38.2.01. Strandfaraskip landsins *(Rakstrarjáttan)* | U | 226.000 | - |
| | **BU** | **1.000** | **-** |

## C. Átekning

**Nr. 1. Høvuðskonta 3.11.1.62. Landsins ognir** *(Løgujáttan)*
Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

# § 6 TILFEINGIS- OG VINNUMÁL

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr. | Nettotal | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 302 | 302 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **-1.070** | - |
| 6.11.1. Fyrisiting | | -1.070 | - |
| **Landbúnaður** | | **2.000** | - |
| 6.33.2. Landbúnaðarstudningur | | 2.000 | - |
| **Sjóvinna** | | **72** | - |
| 6.35.1. Ymsar útreiðslur | | 72 | - |
| **Handil og vinna annars** | | **-700** | - |
| 6.37.2. Ymskur studningur | | -700 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **6.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 6.11.1.06. Tilfeingis- og vinnumálaráðið *(Rakstrarjáttan)* | U | 32.501 | **-** |
| | **BU** | **-1.070** | **-** |
| **6.33.2. Landbúnaðarstudningur** | | | |
| 6.33.2.10. Landbúnaðarstuðul *(Stuðulsjáttan)* | U | 18.020 | **-** |
| | **BU** | **2.000** | **-** |
| **6.35.1. Ymsar útreiðslur** | | | |
| 6.35.1.08. Sjóvinnustýrið (*Rakstrarjáttan*) | U | 16.665 | **-** |
| | **BU** | **72** | **-** |
| **6.37.2. Ymiskur studningur** | | | |
| 6.37.2.16. Kolagrevstur *(Stuðulsjáttan)* | U | 700 | **-** |
| | **BU** | **-700** | **-** |

# § 7 Barna- og útbúgvingarmál

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr. | Nettotal | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 3.650 | 3.650 | - |
| Løguætlan | -2.700 | -2.700 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **-950** | **-** |
| 7.11.1. Fyrisiting | | -950 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | **1.900** | **-** |
| 7.23.2. Fólkaskúlin v.m. | | 0 | - |
| 7.23.3. Miðnámsútbúgvingar | | 4.900 | - |
| 7.23.5. Fólkaupplýsing | | 0 | - |
| 7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking | | -3.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **7.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 7.11.1.09. Barna- og útbúgvingarmálaráðið *(Rakstrarjáttan)* | U | 16.705 | - |
| | **BU** | **-950** | **-** |
| **7.23.2. Fólkaskúlin v.m.** | | | |
| 7.23.2.01. Fólkaskúlin *(Rakstrarjáttan)* | U | 508.752 | **-** |
| | **BU** | **-300** | **-** |
| 7.23.2.02. Sernám *(Rakstrarjáttan)* | U | 50.819 | - |
| | **BU** | **300** | - |
| **7.23.3. Miðnámsútbúgvingar** | | | |
| 7.23.3.05. Miðnámsútbúgvingar *(Rakstrarjáttan)* | U | 278.520 | - |
| | **BU** | **4.600** | - |
| 7.23.3.08. Miðnám í Vestmanna *(Løgujáttan)* | U | 2.000 | - |
| | **BU** | **300** | - |
| **7.23.5. Fólkaupplýsing** | | | |
| 7.23.5.01. Fólkaháskúlar *(Stuðulsjáttan)* | U | 10.835 | - |
| | **BU** | **0** | - |
| **7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking** | | | |
| 7.23.6.05. Maritimir skúlar *(Rakstrarjáttan)* | U | 32.135 | - |
| | **BU** | **-** | **-** |
| 7.23.6.15. Fróðskaparsetur Føroya *(Løgujáttan)* | U | 62.000 | - |
| | **BU** | **-3.000** | - |
| 7.23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya *(Rakstrarjáttan)* | U | 164.745 | |
| | **BU** | - | |

## C. Átekning

**Nr. 2. Høvuðskonta 7.23.5.01. Fólkaháskúlar** *(Stuðulsjáttan)*
Landsstýriskvinnuni verður heimilað í sambandi við samráðingar um leigusáttmála sambært høvuðskontu 7.23.5.02. Ítróttaháskúlin í Suðuroy, løgustuðul, at lata Ítróttaháskúlanum stuðul fyri goldna leigu fyri næmingaheimið fram til, at nýggjur sáttmáli er komin í gildi. Stuðulin svarar til upphæddina, sum landið eigur til góðar hjá Ítróttaháskúlanum, tó í mesta lagi 1,5 mió. kr.

# § 8 ALMANNA- OG HEILSUMÁL

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr. | Nettotal | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -2.900 | -2.900 | - |
| Løguætlan | 18.800 | 18.800 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **-950** | **-** |
| 8.11.1. Fyrisiting | | -950 | - |
| **Heilsumál** | | **18.100** | **-** |
| 8.20.1. Fyribyrging | | 1.400 | - |
| 8.20.2. Heilsutænastur | | -3.000 | - |
| 8.20.3. Sjúkrahúsverkið | | 19.700 | - |
| **Almannamál** | | **-1.250** | **-** |
| 8.21.1. Fyrisiting | | 1.350 | - |
| 8.21.4. Sjúkradagpeningur | | 3.000 | - |
| 8.21.6. Eldri og serforsorg | | 400 | - |
| 8.21.7. Sosialar skipanir | | -1.000 | - |
| 8.21.8. Sosialar pensjónir | | -5.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **8.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 811.1.08. Almanna- og heilsumálaráðið *(Rakstrarjáttan)* | U | 32.246 | - |
| | **BU** | **-950** | **-** |
| **8.20.1. Fyribyrging** | | | |
| 8.20.1.02. Heilsustýrið *(Rakstrarjáttan)* | U | 15.266 | - |
| | **BU** | **1.100** | **-** |
| 8.20.1.10. Koppsetingar *(Lógarbundin játtan)* | U | 7.900 | - |
| | **BU** | **300** | **-** |
| **8.20.2. Heilsutænastur** | | | |
| 8.20.2.03. Heilsutrygdarveitingar *(Rakstrarjáttan)* | U | 302.410 | - |
| | **BU** | **-3.000** | **-** |
| **8.20.3. Sjúkrahúsverkið v.m.** | | | |
| 8.20.3.04. Landssjúkrahúsið *(Rakstrarjáttan)* | U | 1.038.017 | - |
| | **BU** | **900** | **-** |
| 8.20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging *(Løgujáttan)* | U | 53.000 | 30.000 |
| | **BU** | **18.800** | **-** |
| 8.20.3.11. Klaksvíkar sjúkrahús *(Løgujáttan)* | U | 26.000 | - |
| | **BU** | **-** | **-** |
| **8.21.1. Fyrisiting** | | | |
| 8.21.1.02. Almannaverkið *(Rakstrarjáttan)* | U | 79.232 | - |
| | **BU** | **1.350** | **-** |
| **8.21.4. Sjúkradagpeningur** | | | |
| 8.21.4.01. Dagpeningaskipanin *(Lógarbundin játtan)* | U | 105.146 | 20.633 |
| | **BU** | **3.000** | **-** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **8.21.6. Eldri og serforsorg** | | | |
| 8.21.6.09. Trivnaðartænastur *(Rakstrarjáttan)* | U | 516.885 | - |
| | **BU** | **400** | **-** |
| **8.21.7. Sosialar skipanir** | | | |
| 8.21.7.01. Almannatrygd *(Lógarbundin játtan)* | U | 152.154 | 436 |
| | **BU** | **-1.000** | **-** |
| **8.21.8. Sosialar pensjónir** | | | |
| 8.21.8.01. Fólkapensjón *(Lógarbundin játtan)* | U | 750.735 | - |
| | **BU** | **-2.000** | **-** |
| 8.21.8.05. Fyritíðarpensjón *(Lógarbundin játtan)* | U | 374.551 | - |
| | **BU** | **-3.000** | **-** |

# § 13 Uttanríkis- og mentamál

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr. | Nettotal | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.380 | 1.380 | - |
| Løgujáttan | -4.000 | -4.000 | |
| **Felagsútreiðslur** | | **5** | **-** |
| 13.11.1. Fyrisiting | | 5 | |
| **Uttanríkismál** | | **1.500** | **-** |
| 13.13.3. Menningarsamstarv | | 1.500 | |
| **Mentamál** | | **-3.825** | **-** |
| 13.24.2. Skapandi og útinnandi virksemi | | 0 | |
| 13.24.3. Mentanararvur | | -3.825 | - |
| **Handil og vinna annars** | | **-300** | **-** |
| 13.37.2. Ymiskur studningur | | -300 | |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **13.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 13.11.1.59. Uttanríkis- og mentamálaráðið *(Rakstrarjáttan)* | U | 32.009 | - |
| | **BU** | **5** | **-** |
| **13.13.3. Menningarsamstarv** | | | |
| 13.13.3.03. Neyðhjálp og menningarsamstarv *(Stuðulsjáttan)* | U | 15.675 | - |
| | **BU** | **-2.500** | **-** |
| 13.13.3.05. Bátar til Ukraina *(Stuðulsjáttan)* | U | - | - |
| | **BU** | **4.000** | **-** |
| **13.24.2. Skapandi og útinnandi virksemi** | | | |
| 13.24.2.04. Mentanargrunnurin *(Stuðulsjáttan)* | U | 14.080 | - |
| | **BU** | **0** | **-** |
| **13.24.3. Mentanararvur** | | | |
| 13.24.3.12. Tjóðsavnið *(Løgujáttan)* | U | 30.000 | - |
| | **BU** | **-4.000** | **-** |
| 13.24.3.22. Listasøvn *(Rakstrarjáttan)* | U | 6.446 | - |
| | **BU** | **175** | **-** |
| **13.37.2. Ymiskur studningur** | | | |
| 13.37.2.16. Kolagrevstur *(Stuðulsjáttan)* | U | - | - |
| | **BU** | **700** | **-** |
| 13.37.4.09. Landsstreymsverkætlanir, løgustuðul *(Stuðulsjáttan)* | U | 4.000 | - |
| | **BU** | **-1.000** | **-** |

# § 56 SERINNTØKUR, VINNUMÁL

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr. | Nettotal | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | -2.000 | - | 2.000 |
| **Landbúnaður** | | **-** | **2.000** |
| 56.33.2. Landbúnaðarstudningur | | - | 2.000 |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **56.33.2. Landbúnaðarstudningur** | | | |
| 56.33.2.12. Niðurlaðing av Búnaðargrunninum *(Rakstrarjáttan)* | U | - | - |
| | **BU** | **-** | **2.000** |

# Viðmerkingar

# § 2 Løgmansfyrisitingin

## Felagsútreiðslur

### 2.11.1. Fyrisiting

**2.11.1.02. Løgmansskrivstovan** *(Rakstrarjáttan)*

Í sambandi við broytt málsøkjabýti vórðu nógvar flytingar gjørdar millum nýggju stjórnarráðini. Komið er eftir, at nakrar tillagingar skulu verða gjørdar. Frá Løgmansskrivstovuni verða samsvarandi fluttar 275 tús. kr. Somuleiðis verða sparingar gjørdar í lønum og umsitingarkostnaði á tilsamans 2,8 mió. kr. Parturin hjá Løgmansskrivstovuni er 475 tús. kr.

Nýskipanarnevndin hevur havt við sær størri útreiðslur enn væntað í byrjanini, men nú eru tey komin í gongd og hava skipað arbeiðið við regluligum fundum. Í fíggjarlógaruppskotinum er biðið um 300 tús. kr., men dagførd meting í mun til ætlaða virksemi vísur, at neyðugt er at biðja um 200 tús. kr. afturat til arbeiðið hjá nýskipanarnevndini.

Mett verður, at til ber at lækka játtanina til størri vitjanir við 200 tús. kr. í 2026.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 23.213 | -750 | 22.463 |
| 20. Vanligt virksemi | 19.433 | -550 | 18.883 |
| 27. Størri vitjanir | 800 | -200 | 600 |
| 35. Felagsfyrisitingin í Tinganesi | 2.980 | - | 2.980 |

## Landsstýrið

### 2.12.3. Landsstýrið

**2.12.3.01. Løgmaður og landsstýrið** *(Rakstrarjáttan)*

Landsstýrið er umskipað við færri landsstýrisfólkum. Roknað er við løgtingsvali seint í 2026.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 11.966 | -3.366 | 8.600 |
| 20. Vanligt virksemi | 11.966 | -3.366 | 8.600 |

# Samferðsla og samskifti

## 2.38.2. Samferðsla

### 2.38.2.28. Ferðsluveðhald til P/F Eystur- og Sandoyartunlar *(Stuðulsjáttan)*

Raksturin av P/F Eystur- og Sandoyartunlar fer væntandi at javnviga í 2026, og tí kann játtanin til ferðsluveðhaldið verða strikað.

Biðið verður um, at játtað verður 1 mió. kr. á høvuðskontu 3.38.2.01. Strandfaraskip landsins í staðin, soleiðis at møguligt verður hjá Bygdaleiðum at brúka undirsjóvartunlarnar meira og harvið geva eina enn betri tænastu.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.000 | -1.000 | 0 |

# § 3 Fíggjarmál

## Felagsútreiðslur

### 3.11.1. Fyrisiting

**3.11.1.03. Fíggjarmálaráðið** *(Rakstrarjáttan)*

Í sambandi við broytt málsøkjabýti vórðu nógvar flytingar gjørdar millum nýggju stjórnarráðini. Komið er eftir, at nakrar tillagingar skulu verða gjørdar. Til Fíggjarmálaráðið verða samsvarandi fluttar 230 tús. kr. Somuleiðis verða sparingar gjørdar í lønum og umsitingarkostnaði á tilsamans 2,8 mió. kr. Parturin hjá Fíggjarmálaráðnum er 390 tús. kr.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 17.445 | -160 | 17.285 |

**3.11.1.58. Almennir bygningar, søla** *(Løgujáttan)*

Til tess at halda løgukarmin á áleið sama stigi sum í fíggjarlógaruppskotinum verður biðið um, at inntøkujáttanin verður hækkað við 1 mió. kr. í 2026.

| Tús. kr. | **U** | **BU** | **U+BU** |
|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | 13.000 | 1.000 | 14.000 |

**3.11.1.62. Landsins ognir** *(Løgujáttan)*

Biðið verður um, at soljóðandi átekning verður tikin við fyri løgujáttanina í 2026:

**Átekning**

Landsstýriskvinnuni verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

| Tús. kr. | **U** | **BU** | **U+BU** |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 4.000 | - | 4.000 |

## Fíggjarmál o.a.

### 3.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m.

**3.15.1.12. Nýggj skattaskipan** *(Løgujáttan)*

Til tess at halda løgukarmin á áleið sama stigi sum í fíggjarlógaruppskotinum verður biðið um, at játtanin til nýggja skattaskipan verður lækkað við 1 mió. kr. í 2026.

| Tús. kr. | **U** | **BU** | **U+BU** |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 18.000 | -1.000 | 17.000 |

### 3.15.2. Hagfrøði

**3.15.2.01. Hagstova Føroya** *(Rakstrarjáttan)*

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026 eru 400 tús. kr. raðfestar á høvuðskontu 7.11.1.09. Barna- og útbúgvingarmálaráðið, undirkonta 20. Vanligt virksemi, sum partur í fíggingini av at framleiða hagtøl fyri dagstovnaøki umframt barna- og ungdómsøki sum heild, sum Hagstovan fer at standa fyri at gera, í samstarvi við Barna- og útbúgvingarmálaráðið. Metti kostnaðurin av at framleiða hagtølini er 1,16 mió. kr. um árið.

Umframt raðfestingina á 400 tús. kr. á játtanini hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum verða 500 tús. kr. raðfestar á høvuðskontu 7.11.1.09. Barna- og útbúgvingarmálaráðið, undirkonta 23. Barnaverkætlan til at framleiða hagtølini. Samanlagt verða 900 tús. kr. brúktar til endamálið í 2026.

Eftir avtalu við Hagstovuna verða hesar 900 tús. kr. fluttar á játtanina hjá Hagstovuni.

Restin av játtanini upp til 1,16 mió. kr. verður ætlandi raðfest til Hagstovuna í fíggjarlógini fyri 2027.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 16.544 | 900 | 17.444 |
| 20. Vanligt virksemi | 16.544 | 900 | 17.444 |

## Samferðsla og samskifti

### 3.38.1. Vegir og havnir

**3.38.1.02. Landsverk** *(Rakstrarjáttan)*

Avtalað er millum Landsverk og Sjóvinnustýrið, at Sjóvinnustýrið yvirtekur tann partin av eftirlitinum av vitaverkinum sum liggur hjá Landsverki pr. 1. januar 2026, meðan raksturin framhaldandi verður hjá Landsverki.

Játtanin verður lækkað við 72 tús. kr., sum verða fluttar til høvuðskontu 6.35.1.08. Sjóvinnustýrið *(Rakstrarjáttan)*.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 64.194 | -72 | 64.122 |

**3.38.1.07. Nýggir landsvegir** *(Løgujáttan)*

Til tess at halda løgukarmin á áleið sama stigi sum í fíggjarlógaruppskotinum verður biðið um, at játtanin til Tjørnuvíkarvegin, tunnil verður lækkað við 2 mió. kr. í 2026.

| Tús. kr. | **U** | **BU** | **U+BU** |
|---|---:|---:|---:|
| Útreiðslujáttan | 60.500 | -2.000 | 58.500 |
| Inntøkujáttan | 100 | - | 100 |
| 10. Nýgerð av landsvegum | 48.500 | -2.000 | 46.500 |
| 11. Asfaltering av landsvegunum | 12.000 | - | 12.000 |

## 3.38.2. Samferðsla

**3.38.2.01. Strandfaraskip landsins** *(Rakstrarjáttan)*

Raksturin av P/F Eystur- og Sandoyartunlar fer væntandi at javnviga í 2026, og tí kann játtanin á høvuðskontu 2.38.2.28. Ferðsluveðhald til P/F Eystur- og Sandoyartunlar verða strikað.

Biðið verður um, at játtað verður 1 mió. kr. til Strandfaraskip landsins í staðin, soleiðis at møguligt verður hjá Bygdaleiðum at brúka undirsjóvartunlarnar meira og harvið geva eina enn betri tænastu.

| Tús. kr. | **U** | **BU** | **U+BU** |
|---|---:|---:|---:|
| Nettoútreiðslujáttan | 226.000 | 1.000 | 227.000 |

# § 6 Tilfeingis- og vinnumál

## Felagsútreiðslur

### 6.11.1. Fyrisiting

**6.11.1.06. Tilfeingis- og vinnumálaráðið** *(Rakstrarjáttan)*
Í sambandi við broytt málsøkjabýti vórðu nógvar flytingar gjørdar millum nýggju stjórnarráðini. Komið er eftir, at nakrar tillagingar skulu verða gjørdar. Frá Tilfeingis- og vinnumálaráðnum verða samsvarandi fluttar 450 tús. kr. Somuleiðis verða sparingar gjørdar í lønum og umsitingarkostnaði á tilsamans 2,8 mió. kr. Parturin hjá Tilfeingis- og vinnumálaráðnum er 620 tús. kr.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 32.501 | -1.070 | 31.431 |

## Landbúnaður

### 6.33.2. Landbúnaðarstudningur

**6.33.2.10. Landbúnaðarstuðul** *(Stuðulsjáttan)*
Teksturin til játtan til landbúnaðarstuðul verður broyttur og kemur niðanfyristandandi tekstur ístaðin fyri tekstin í fíggjarlógaruppskotinum. Broytti teksturin er rættaður til, so at teksturin er í samsvari við landbúnaðarpakkan sum kemur í gildi 1. januar 2026.

Partur av landbúnaðarstuðlinum verður frá 1. januar 2026 fíggjaður av Búnaðargrunninum. Samlaði landbúnaðarstuðulin verður sostatt hækkaður frá 18.020 tús. kr. til 20.020 tús. kr.

"Landbúnaðarstuðul verður veittur við heimild í løgtingslóg nr. 89 frá 7. mai 2025 um landbúnaðarstuðul, við gildiskomu 1. januar 2026. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um umsiting av landbúnaðarstuðlinum, undir hesum eisini reglur um oyðubløð, kravdar upplýsingar, afturgjalding o.a. (arbeiðið við nýggjari reglugerð er ávegis). Sbrt. § 3 í lógini umsitur Búnaðarstovan landbúnaðarstuðulin.

Stuðul verður veittur til vinnuliga framleiðslu av mjólk, seyðakjøti, neytakjøti, flogfenaði, eggum, grøði og stráfóðri. Stuðulin verður latin eftir umsókn og er treytaður av, at umsøkjarin hevur bókhaldsskyldu og er mvg-skrásettur, og at umsøkjarin hevur haft ein umsetning upp á í minsta lagi 50.000 kr.

Stuðul verður somuleiðis veittur til avloysaraskipan fyri mjólkbøndur. Stuðulin verður veittur sum eitt ískoyti til ta skipan, har mjólkarframleiðarar og mjólkarvirki rinda eina nærri ásetta upphædd í grunn at gjalda avloysing fyri. Upphæddin verður roknað fyri hvønn litur av innvigaðari mjólk.

Stuðul verður harumframt veittur teimum, sum halda og hava føroysk húsdjórasløg, t.e. ross, gæs og dunnur. Í hesum førum er ikki krav um vinnuliga skráseting.

**Undirkonta 01. Mjólk**
Stuðul verður latin mjólkarvirki fyri mjólk, sum er í 1. flokki. Stuðul verður latin fyri hvønn litur av rámjólk, sum verður latin mjólkarvirkinum eftir váttaðum innvigingarlista.

**Undirkonta 02. Neytakjøt**
Stuðul verður latin framleiðarum, sum selja kálvakjøt og neytakjøt. Stuðul verður latin fyri hvørt kilo, sum er selt og váttað.

Stuðul verður latin teimum, sum gøða kálvar til matna. Stuðul at gøða kálvar fram til slakt verður játtaður fyri hvønn kálv sær fyri í mesta lagi 24 mánaðir og verður útgoldin, tá kálvurin er ávikavist 12 og 24 mánaðir gamal.

Stuðulin verður umsitin sambært reglugerð. Í hesum sambandi skal nýggj reglugerð gerast.

**Undirkonta 03. Seyðakjøt**
Stuðul verður latin framleiðarum, sum selja seyðakjøt. Stuðul verður latin fyri hvørt kilo, sum er selt og váttað.

Talan er um nýggjan stuðulshátt, nýggj reglugerð kemur at áseta hvussu stuðulin skal umsitast.

**Undirkonta 04. Stráfóður**
Studningur verður latin at framleiða stráfóður, t.d. hoyggj og súrhoyggj í brunni ella rullubyrðu, og annað djórafóður, t.d. fóðurrøtur. Stuðul verður latin fyri hvørja fóðureind, sum er seld og/ella váttað.

Ásett verður í reglugerð hvussu stuðulin verður umsitin og útgoldin.

Játtanin fyri 2026 er lækkað við 200 tús. kr.

**Undirkonta 07. Húsdýralógin**
Við nýggja landbúnaðarpakkanum fer løgtingslóg nr 18 frá 1. mai 1961 um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið úr gildi. Játtanin á undirkontu 07. Húsdýralógin verður niðurløgd. Játtanin á 20 tús. kr. verður flutt til undirkontu 10. Føroysk húsdjór.

**Undirkonta 08. Avloysaraskipan**
Stuðul verður veittur sum eitt ískoyti til skipanina, har mjólkarframleiðarar og mjólkarvirki rinda eina nærri ásetta upphædd fyri hvønn litur av innvigaðari mjólk.

**Undirkonta 10. Føroysk húsdjór**
Fyri føroysk ross, sum verða ella skulu verða brúkt í alingini, verður latin árligur stuðul. Fyri føroyskar gæs og dunnur verður latin árligur stuðul.
Ásett verður í reglugerð hvussu stuðulin veðrur umsitin og útgoldin.
Játtanin hækkar við 20 tús. kr. upp í 320 tús. kr.

**Undirkonta 11. Grønmetisframleiðsla**

Sambært løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 90 frá 7. mai 2025 § 10c stk 1-3 verða 10 mió. kr. av fæi grunnsins settar á serstaka kontu, ætlað til stuðul at menna og gagnnýta landbúnaðarframleiðslu. Upphæddin verður flutt úr grunninum við 2 mió. kr. um árið í fimm ár. Hesin stuðul verður latin samsvarandi ásetingunum í løgtingslóg um landbúnaðarstuðul.
Játtanin til økið í 2026 er 2 mió. kr.

**Undirkonta 12. Seyðakanningar**

Tørvurin til seyðakanningar er minkaður eitt vet, og lækkar játtanin fyri 2026 við 200 tús. kr. Heilsufrøðiliga Starvsstovan ger kanningarnar og umsitur játtanina."

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 18.020 | 2.000 | 20.020 |
| 01. Mjólk | 7.220 | - | 7.220 |
| 02. Neytakjøt | 1.100 | - | 1.100 |
| 03. Seyðakjøt | 2.900 | - | 2.900 |
| 04. Stráfóður | 5.800 | - | 5.800 |
| 07. Húsdýralógin | 20 | -20 | 0 |
| 08. Avloysaraskipan | 480 | - | 480 |
| 10. Føroysk húsdjór | 300 | 20 | 320 |
| 11. Grønmetisframleiðsla | - | 2.000 | 2.000 |
| 12. Seyðakanningar | 200 | - | 200 |

# Sjóvinna

## 6.35.1. Ymsar útreiðslur

**6.35.1.08. Sjóvinnustýrið** *(Rakstarjáttan)*

**Undirkonta 23. Vitaverk og sjóuppmerking**

Avtalað er millum Landsverk og Sjóvinnustýrið, at Sjóvinnustýrið yvirtekur tann partin av eftirlitinum av vitaverkinum sum liggur hjá Landsverki pr. 1. januar 2026, meðan raksturin framhaldandi verður hjá Landsverki.

Játtanin verður hækkað við 72 tús. kr., sum verða fluttar frá høvuðskontu 3.38.1.02. Landsverk *(Rakstarjáttan)*.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 16.665 | 72 | 16.737 |

# Handil og vinna annars

## 6.37.2. Ymiskur studningur

**6.37.2.16. Kolagrevstur** *(Stuðulsjáttan)*

Landsstýrið er samt um, at játtanin til kolagrevstur er til at varðveita siðaarv og er semja um at játtanin í síni heild skal flytast frá vinnumálum til mentamál.
Játtanin verður tí flutt til § 13 Uttanríkis- og mentamál.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 700 | -700 | 0 |

# § 7 Barna- og útbúgvingarmál

## Felagsútreiðslur

### 7.11.1. Fyrisiting

**7.11.1.09. Barna- og útbúgvingarmálaráðið** *(Rakstrarjáttan)*

Sparingar verða gjørdar í lønum og umsitingarkostnaði á tilsamans 2,8 mió. kr. Parturin hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum er 50 tús. kr.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026 eru 400 tús. kr. raðfestar á undirkontu 20. Vanligt virksemi (Barna- og útbúgvingarmálaráðið), sum partur í fíggingini av at framleiða hagtøl fyri dagstovnaøki umframt barna- og ungdómsøki sum heild, sum Hagstovan fer at standa fyri at gera, í samstarvi við Barna- og útbúgvingarmálaráðið. Metti kostnaðurin av at framleiða hagtølini er 1,16 mió. kr. um árið.

Umframt raðfestingina á 400 tús. kr. á játtanini hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum verða 500 tús. kr. raðfestar á játtanini til Barnaverkætlanina til at framleiða hagtølini. Samanlagt verða 900 tús. kr. brúktar til endamálið í 2026.

Eftir avtalu við Hagstovuna verða hesar 900 tús. kr. fluttar á játtanina hjá Hagstovuni, høvuðskonta 3.15.2.01. Hagstova Føroya, undirkonta 20. Vanligt virksemi.

Restin av játtanini upp til 1,16 mió. kr. verður ætlandi raðfest til Hagstovuna í fíggjarlógini fyri 2027.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 16.705 | -950 | 15.755 |
| 20. Vanligt virksemi | 13.100 | -450 | 12.650 |
| 23. Barnaverkætlan | 3.605 | -500 | 3.105 |

## Útbúgving og gransking

### 7.23.2. Fólkaskúlin v.m.

**7.23.2.01. Fólkaskúlin** *(Rakstrarjáttan)*

Í fíggjarlógaruppskotinum eru 300 tús. kr. raðfestar til at námsfrøðingar í serstovu í fólkaskúlanum fáa møguleika at fáa fullan brøk.

Talan er um eitt mál, sum er knýtt at avtalu um arbeiðstíðina hjá námsfrøðingum í fólkaskúlanum, og tí eisini eitt mál, sum má viðgerast millum partarnar, sum varða av sáttmálanum á økinum. Av tí at arbeiðstíðaravtala enn ikki er gjørd fyri, hvussu námsfrøðingar í fólkaskúlanum kunnu arbeiða fullan brøk, verður upphæddin umraðfest. Í løtuni veit Barna- og útbúgvingarmálaráðið ikki, nær arbeiðstíðaravtalan verður gjørd.

Tí hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið valt at umraðfesta hesar 300 tús. kr. til høvuðskontu 7.23.2.02. Sernám, undirkonta 23. Skúlin á Trøðni.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 508.752 | -300 | 508.452 |
| 20. Vanligt virksemi | 508.752 | -300 | 508.452 |

**7.23.2.02. Sernám** *(Rakstrarjáttan)*

**Undirkonta 23. Skúlin á Trøðni**

Skúlin á Trøðni er eftirhondini blivin ein stórur serskúli við í løtuni 72 innskrivaðum næmingum. Hartil er nýtt heildagstilboð nýliga byrja á skúlanum, undir leiðslu av skúlastjóranum á Skúlanum á Trøðni.

Skúlin á Trøðni hevur tí víst á, at tað er stórur tørvur á at fáa sett ein varaskúlastjóra, ið kann verða við til at leiða virksemið á skúlanum saman við skúlastjóranum. Til hetta endamálið verða 300 tús. kr. raðfestar til Skúlan á Trøðni, soleiðis at tað ber til at seta ein varaskúlastjóra. Ætlandi fer varaskúlastjórin eisini at undirvísa.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 50.819 | 300 | 51.119 |
| Útreiðslur | 54.677 | 300 | 54.977 |
| Inntøkur | 3.858 | - | 3.858 |
| 20. Sernám | 26.553 | - | 26.553 |
| 23. Skúlin á Trøðni | 24.266 | 300 | 24.566 |
| 24. Frítíðarskúli, skúlin á Trøðni | 0 | - | 0 |

## 7.23.3. Miðnámsútbúgvingar

**7.23.3.05. Miðnámsútbúgvingar** *(Rakstrarjáttan)*

Í sambandi við at kommunurnar yvirtaka ábyrgdina av demensøkinum frá 1. januar 2026, er avtala við kommunurnar, at tær ikki longur skulu rinda rakstrarstuðul til lærlingaundirvísingina frá 2026 at roknað. Kostnaðurin fyri hvørt av hesum er áleið 4,6 mió. kr., og er hetta tí útreiðsluneutralt fyri land og kommunur. Við hesi broyting verða 4,6 mió. kr. fluttar frá høvuðskontu 12.21.6.09. Trivnaðartænastur, undirkonta 20. Vanligt virksemi.

Av miðnámsskúlunum eru tað Tekniski skúli í Klaksvík og Glasir, ið hava lærlingaundirvísing, og sum tí móttaka kommunalan rakstrarstuðul. Játtanin á undirkontu 26. Tekniski skúli í Klaksvík hækkar við 1.550 tús. kr. og játtanin á undirkontu 31. Glasir, Skúladepilin í Marknagili hækkar við 3.050 tús. kr., ið svarar til tað sum kommunurnar hava goldið skúlunum í 2024.

Á undirkonta 31. Glasir er játtanin í fíggjarlógaruppskotinum lækkað við 1,5 mió. kr. tí eingin upptøka skuldi verða á útbúgvingunum Klædnaatstøði og Tilvirkisatstøði á Glasir. Hendan ætlanin er slept, og játtanin til Glasir hækkar tí við 750 tús. kr. til økta undirvísingarvirksemi. Samlaða játtanin á miðnám verður tó óbroytt og verða tí sparingar

lutfalsliga deildar út á allar miðnámsskúlarnar fyri somu upphædd. Ymsar tillagingar verða tí gjørdar í rakstrinum hjá øllum miðnámsskúlunum.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 278.520 | 4.600 | 283.120 |
| Útreiðslur | 295.770 | 4.600 | 300.370 |
| Inntøkur | 17.250 | - | 17.250 |
| 22. Klaksvíkar HF-skeið | 4.011 | -11 | 4.000 |
| 23. Miðnámsskúlin í Suðuroy | 19.779 | -54 | 19.725 |
| 26. Tekniski skúli í Klaksvík | 31.994 | 1.456 | 33.450 |
| 27. Miðnám í Vestmanna | 10.717 | -28 | 10.689 |
| 28. Felags fyri miðnámsskúlar | 9.747 | - | 9.747 |
| 30. Heilsuskúli Føroya | 11.513 | -28 | 11.485 |
| 31. Glasir, Skúladepilin í Marknagili | 133.578 | 3.423 | 137.001 |
| 32. Miðnám á Kambsdali | 57.181 | -158 | 57.023 |

**7.23.3.08. Miðnám í Vestmanna** *(Løgujáttan)*

Landsverk hevur boðað frá, at stovnurin væntar ikki at klára at gera arbeiðið við sóttreinsingarskipanini fyri mettu 2 mió. kr., men at játtast mugu 300 tús. kr. afturat. Raðfestar verða tí 300 tús. kr. afturat til verkætlanina, ið verður mett at kostað 2,3 mió. kr.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 2.000 | 300 | 2.300 |
| 11. Sóttreinsingarskipan | 2.000 | 300 | 2.300 |

## 7.23.5. Fólkaupplýsing

**7.23.5.01. Fólkaháskúlar** *(Stuðulsjáttan)*

**Undirkonta 21. Ítróttaháskúlin í Suðuroy**

Síðani Ítróttaháskúlin í 2021 flutti inn í næmingaheimið, ið Ítróttaháskúlin leigar frá Bústøðum, hevur Ítróttaháskúlin borið allan leigukostnaðin. Av tí orsøk hevur háskúlin undirskot, hóast nógv virksemi hevur verið, umframt at spart er í rakstrinum.

Rakstrarstuðul verður latin sambært fíggjarætlan. Sparingar hjá Ítróttaháskúlanum hava tí havt við sær, at háskúlin hevur fingið ov nógv útgoldið í rakstrarstuðli. Háskúlin skyldar landskassanum í løtuni um 1,2 mió. kr.

Við eykajáttan fyri september 2025 varð heimild fingin at lata 7,3 mió. kr. í løgustuðli til næmingaheimið. Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Fíggjarmálaráðið samráðast við Bústaðir um leigutreytir, tá ið løgustuðul er latin til næmingaheimið.

Ein endurskoðaður leigusáttmáli hevur við sær, at leigan verður passað til raksturin hjá Ítróttaháskúlanum. Men neyðugt verður at taka hædd fyri tí millumverandi, sum háskúlin hevur við landið, tí at háskúlin longu hevur goldið fyri hægri leigu. Tí verður skúlin góðskrivaður soleiðis, at ov nógv goldin stuðul frá landinum ikki skal verða goldin aftur.

Biðið verður um, at soljóðandi átekning verður tikin við fyri játtanina í 2026:

**Átekning**

Landsstýriskvinnuni verður heimilað í sambandi við samráðingar um leigusáttmála sambært høvuðskontu 7.23.5.02. Ítróttaháskúlin í Suðuroy, løgustuðul, at lata Ítróttaháskúlanum stuðul fyri goldna leigu fyri næmingaheimið fram til, at nýggjur sáttmáli er komin í gildi. Stuðulin svarar til upphæddina, sum landið eigur til góðar hjá Ítróttaháskúlanum, tó í mesta lagi 1,5 mió. kr.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 10.835 | 0 | 10.83 |
| 20. Føroya Fólkaháskúli | 3.910 | - | 3.910 |
| 21. Ítróttaháskúlin í Suðuroy | 6.925 | 0 | 6.925 |

## 7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking

**7.23.6.05. Maritimir skúlar** *(Rakstrarjáttan)*

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026 eru játtanirnar til Vinnuháskúlan og Sjónám lækkaðar ávikavist 800 tús. kr. og 200 tús. kr. vegna samskipan av upptøku av skiparaflokkum millum Vinnuháskúlan og Sjónám.

Eftir at skúlarnir hava viðgjørt málið um samskipaða upptøku víðari saman við Undirvísingarstýrinum, meta skúlarnir báðir, at tað eru ov nógvar óvissir og avbjóðingar, sum gera, at tað er ikki ráðiligt at fara undir at samskipa upptøkuna longu í 2026. Ístaðin verður ein arbeiðsbólkur settur at viðgera nærri, hvussu ein samskipað upptøka kann verða framd og tættari samstarv kann fáast í lag. Samskipaða upptøkan verður tískil útsett til 2027.

Játtanin sambært fíggjarlógaruppskotinum verður óbroytt, men aðrar tillagingar verða gjørdar ístaðin. Á Vinnuháskúlanum verður upptøkan av maskinmeistaraaspirantum flutt frá januar 2026 til august 2026, og næsta upptøkan av maskinistum verður flutt frá oktober 2026 til mars 2027. Upptøka av maskinmeistaraaspirantum er eina ferð um árið, og Vinnuháskúlin hevur fyrr havt hesa upptøku í august, ið skúlin eisini metir hóskar væl til virksemi á skúlanum og útbúgvingargongdina hjá næmingunum. Á Sjónám verða ymsar tillagingar gjørdar í rakstrinum.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 32.135 | - | 32.135 |
| Útreiðslur | 43.122 | - | 43.122 |
| Inntøkur | 10.987 | - | 10.987 |
| 20. Vinnuháskúlin | 25.354 | - | 25.354 |
| 22. Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli) | 3.823 | - | 3.823 |
| 23. Sjónám (Trygdarmiðstøðin og skeiðsvirksemi) | 2.286 | - | 2.286 |
| 30. Føroya Brandskúli | 1.152 | - | 1.152 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | -480 | - | -480 |

**7.23.6.15. Fróðskaparsetur Føroya** *(Løgujáttan)*

Til tess at halda løgukarmin á áleið sama stigi sum í fíggjarlógaruppskotinum verður biðið um, at játtanin til Fróðskaparsetur Føroya verður lækkað við 3 mió. kr. í 2026.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 62.000 | -3.000 | 59.000 |

**7.23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya** *(Rakstrarjáttan)*

Fróðskaparsetrið hevur slept ætlanini um at broyta upptøkuna til KT-verkfrøði frá upptøku á hvørjum ári til upptøku annað hvørt ár.

Tillagingin á 2,2 mió. kr. í rakstrinum hjá Fróðskaparsetrinum verður tó framd sum ætlað, við at broyta upptøkuna av nøkrum útbúgvingum frá upptøku á hvørjum ári, til upptøku annað og triðja hvørt ár. Endalig avgerð er ikki tikin um hvørjar útbúgvingar talan verður um. Fróðskaparsetrið arbeiðir víðari við hesum, og tekur endaliga avgerð um hvat verður gjørt.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 164.745 | - | 164.745 |
| Útreiðslur | 185.759 | - | 185.759 |
| Inntøkur | 21.014 | - | 21.014 |
| 20. Fróðskaparsetur Føroya | 163.745 | - | 163.745 |
| 27. Máltøknidepilin | 1.000 | - | 1.000 |
| 40. Stuðulsfíggjað virksemi | 0 | - | 0 |
| 45. Inntøkufíggjað virksemi | 0 | - | 0 |

# § 8 Almanna- og heilsumál

## Felagsútreiðslur

### 8.11.1. Fyrisiting

**8.11.1.08. Almanna- og heilsumálaráðið** *(Rakstrarjáttan)*
Í sambandi við broytt málsøkjabýti vórðu nógvar flytingar gjørdar millum nýggju stjórnarráðini. Komið er eftir, at nakrar tillagingar skulu verða gjørdar. Frá Almanna- og heilsumálaráðnum verða samsvarandi fluttar 330 tús. kr. Somuleiðis verða sparingar gjørdar í lønum og umsitingarkostnaði á tilsamans 2,8 mió. kr. Parturin hjá Almanna- og heilsumálaráðnum er 620 tús. kr.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 32.246 | -950 | 31.296 |

## Heilsumál

### 8.20.1. Fyribyrging

**8.20.1.02. Heilsustýrið** *(Rakstrarjáttan)*

Biðið verður um at játtanin verður hækka við 1,1 mió. kr. til læknafakligan førleika á stovninum.

| Tús. kr. | **U** | **BU** | **U+BU** |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 15.266 | 1.100 | 16.366 |
| 20. Heilsutrygdarveitingar | 15.266 | 1.100 | 16.366 |
| 45. Inntøkufíggjað virksemi | 0 | - | 0 |

**8.20.1.10. Koppsetingar** *(Lógarbundin játtan)*
Biðið verður um brot í viðmerkinginum verður orðað soleiðis:

"Barnakonur kunnu verða koppsettar ókeypis fyri kikhosta. Harumframt kunnu barnakonur verða koppsettar ókeypis fyri RS-virus í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. januar og frá 1. mai til 31. desember."

Biðið verður um, at játtanin verður hækkað við 300 tús. kr. til koppsetingar fyri RS-virus.

| Tús. kr. | **U** | **BU** | **U+BU** |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 7.900 | 300 | 8.200 |
| 01. Koppsetingar | 7.900 | 300 | 8.200 |

### 8.20.2. Heilsutænastur

**8.20.2.03. Heilsutrygdarveitingar** *(Rakstrarjáttan)*

Heilsutrygd hevur gjørt nýggjar metingar, ið vísa at játtanin til Heilsutrygdarveitingar kann verða lækkað við 3 mió. kr. í 2026.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 302.410 | -3.000 | 299.410 |
| 20. Heilsutrygdarveitingar | 265.240 | -3.000 | 262.240 |
| 21. Hjálparráð | 37.170 | - | 37.170 |

## 8.20.3. Sjúkrahúsverkið

**8.20.3.04. Landssjúkrahúsið** *(Rakstrarjáttan)*

**Undirkonta 20. Vanligt virksemi**
**Dialysukoyring**
Verandi veitari, sum hevur koyrt sjúklingar til dialysu hevur sagt avtaluna upp til 31. desember 2025. Henda avtalað hevur verið galdandi í fleiri ár. Landssjúkrahúsið hevur tí haft útboð um dialysukoyringina.

Áhugin fyri útboðnum var ikki stórur. Tað var bert ein veitari, sum bjóðaði uppá uppgávuna, og núverandi veitari var ikki áhugaður í at halda fram. Núverandi avtala kostar umleið 1,6 mió. kr., meðan nýggja avtalan fer at kosta 2,6 mió. kr. Talan er sostatt um eina prísøking, sum er 1 mió. kr. árliga.

**22. Serviðgerð uttanlands**
Í sambandi við tillagingar av rakstrinum verður biðið um, at játtanin verður lækkað við 2,2 mió. kr. í 2026.

**28. Avseting til serlæknar**
Sambært tilmælinum "Tørvurin á serlæknum í føroyska heilsuverkinum" frá 2024, eisini nevnd 'dimensioningsætlanin', er tørvur á at seta fleiri serlæknar í Føroyum innan ymisk serlæknaøki.
Biðið verður um, at játtanin verður hækkað við 3,5 mió. kr. soleiðis, at 3,95 mió. kr. eru til endamálið í 2026.

**32. Krabbameinsátøk**
Játtanin er til at verkseta átøk úr Krabbameinsætnini frá 2022. Eitt krabbameinsráð ger tilmæli um, hvørji átøk hvørji átøk skulu verksetast.
Biðið verður um, at játtanin verður hækkað við 600 tús. kr. soleiðis, at 2,1 mió. kr. verða til endamálið í 2026.

**Undirkonta 33. H-bygningurin, kliniskt virksemi**
Vegna seinkaða flyting í H-bygningin verður ikki fult kliniskt virksemi í 2026. Tí verður mett, at játtanin kann lækkast í 2026. Væntandi verður fult virksemi tó í 2027.
Biðið verður um, at játtanin verður lækkað við 2 mió. kr. í 2026.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 1.038.017 | 900 | 1.038.917 |
| 20. Vanligt virksemi | 799.389 | 1.000 | 800.389 |
| 22. Serviðgerð uttanlands | 151.424 | -2.200 | 149.224 |
| 25. Flutningur og uppihald | 29.324 | - | 29.324 |
| 26. Sjúklingahotellið Tórshavn | 29.930 | - | 29.930 |
| 27. KT-øki heilsuverksins | 11.294 | - | 11.294 |
| 28. Avseting til serlæknar | 450 | 3.500 | 3.950 |
| 31. Steno miðstøðin | 0 | - | 0 |
| 33. Krabbameinsátøk | 1.500 | 600 | 2.100 |
| 33. H-bygningurin, kliniskt virksemi | 15.006 | -2.000 | 13.006 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí) | -300 | - | -300 |
| 45. Stuðulsfíggjað virksemi | 0 | - | 0 |

**8.20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging** *(Løgujáttan)*

**Undirkonta 10. Landssjúkrahúsið**

Ein kostnaðarmeting er gjørd fyri at gera ábøtur á og at skifta vindeygu í H-bygninginum, umframt at skifta úthurðar, sum vísir ein kostnað á 32,8 mió. kr. Harumframt verður roknað við 1 mió. kr. í sambandi við gerðarættarmál í hesum sambandi. Verklagslóg verður løgd fyri Løgtingið.

Biðið verður um, at játtanin verður hækkað við 18,8 mió. kr.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 53.000 | 18.800 | 71.800 |
| Inntøkujáttan | 30.000 | - | 30.000 |
| 10. Landssjúkrahúsið | 15.000 | 18.800 | 33.800 |
| 12. Landssjúkrahúsið, Steno miðstøðin | 0 | - | 0 |
| 15. Landssjúkrahúsið, viðlíkahald | 8.000 | - | 8.000 |

**8.20.3.11. Klaksvíkar sjúkrahús** *(Løgujáttan)*

Játtanin til Klaksvíkar sjúkrahús er ætlað til starvsfólkabygningin og til móttøku til sjúkraflutningstænastuna. Ætlanin at gera móttøkuna var partur av viðgerðini av løgtingsfíggjarlógini fyri 2023 (LM-047/2022), har tað í álitinum frá Løgtingsins fíggjarnevnd verður biðið um, at ætlanin um móttøku til sjúkratænastuna, sum lýst í støðulýsingini í heildarætlanini fyri sjúkrahúsverkið, verður tikin við í verkætlanina.

Í fíggjarætlanini hava 4 mió. kr. verið avsettar til verkætlanina. Verkætlanin av móttøkuni hevur nú verið í útboði og er samlaði kostnaðurin 5,34 mió. kr. Munurin sum er 1,34 mió. kr. skal sostatt játtast í 2027.

Biðið verður um, at tað sum tekstviðmerking verður sett, at av játtanini verða 5,34 mió. kr. brúktar til ætlanina við móttøku til sjúkraflutningstænastuna.

# Almannamál

## 8.21.1. Fyrisiting

**8.21.1.02. Almannaverkið** *(Rakstrarjáttan)*

Uppskot til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar leggur nýggjar uppgávur til Almannaverkið viðvíkjandi burturriknu ukrainunum.

Almannaverkið fær við uppskotinum møguleika til at arbeiða meira aktivt við at fáa burturriknu ukrainarnar út á føroyska arbeiðsmarknaðin, eitt nú gjøgnum arbeiðsbúgving og virknisvenjing. Almannaverkið skal harafturat gera avtalu við Reyða Kross um, at Reyði Krossur røkir uppgávuna sum sosialur samskipari í málum um bráðfeingis bústað. Higartil hevur Reyði Krossur, eftir avtalu við Løgmálaráðið, tikið sær av uppgávuni sum sosialur samskipari í bráðfeingis bústøðunum, og fer væntandi eisini at taka sær av uppgávuni, tá Almannaverkið hevur yvirtikið ábyrgdina frá Løgmálaráðnum, hóast endalig avtala ikki er gjørd um hetta enn. Tilsamans verður neyðugt við tveimum ársverkum, annað til ein málsviðgera (sosialráðgeva) innanhýsis á Almannaverkinum, hitt til sosiala samskiparan í málum um bráðfeingis bústaðir, sum Reyði Krossur tekur sær av.

Arbeiðið við burturriknu ukrainunum hevur víst seg at vera serliga sálarliga krevjandi fyri sosialráðgevarnar í Almannaverkinum, og hevur Almannaverkið tí eisini tørv á 100 tús. kr. um árið til supervisjón av sosialráðgevum, sum hava hesi málini um hendi, umframt 100 tús. kr. um árið til keyp av tulkatænastum.

Samanlagt verður biðið 1.350 tús. kr. árliga fyri at røkja tær uppgávur, sum lógaruppskotið leggur til Almannaverkið og Reyða Kross.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 79.232 | 1.350 | 80.582 |
| 20. Vanligt virksemi | 67.526 | - | 67.526 |
| 21. Hjálpartól | 9.752 | - | 9.752 |
| 22. Teknmálstulkatænastan | 1.939 | - | 1.939 |
| 24. Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi | 15 | - | 15 |
| 25. Átøk at hjálpa burturriknum ukrainum | - | 1.350 | 1.350 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi, Hjálpartólamiðstøðin | 0 | - | 0 |

## 8.21.4. Sjúkradagpeningur

**8.21.4.01. Dagpeningaskipan** *(Lógarbundin játtan)*

Nýggjar metingar vísa, at tørvur er á at hækka játtanina til undirkontu 01. Løntakarar við 2,5 mió. kr. og játtanina til undirkontu 02. Sjálvboðin trygging við 500 tús. kr.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 105.146 | 3.000 | 108.146 |
| Inntøkujáttan | 20.633 | - | 20.633 |
| 01. Løntakarar | | | |
| Útreiðslur | 101.205 | 2.500 | 103.705 |
| *Inntøkur* | *4.410* | - | *4.410* |
| 02. Sjálvboðin trygging | | | |
| Útreiðslur | 2.591 | 500 | 3.091 |
| *Inntøkur* | *693* | - | *693* |
| 04. Gjald fyri læknaváttanir | 1.350 | - | 1.350 |
| *09. Arbeiðsgevarans partur, dagpengar* | *15.530* | - | *15.530* |

## 8.21.6. Eldri og serforsorg

**8.21.6.09. Trivnaðartænastur** *(Rakstrarjáttan)*

Biðið verður um, at játtanin til Trivnaðartænastur verður hækkað við 5 mió. kr. til at seta á stovn tvær einstaklingafyriskipanir. Talan er um eitt serligt tilboð, ætlað barni, sum ikki kann rúmast í einum kommunalum dagstovnatilboði. Og eitt umfatandi heildartilboð til borgara við samansettum trupulleikum, sum hevur verið á barnaverndarstovni í Danmark, men nú er vorðin vaksin og er fluttur aftur til Føroya.

Í sambandi við, at kommunurnar yvirtaka ábyrgdina av demensøkinum frá 1. januar 2026, er avtalað við kommunurnar, at tær ikki longur skulu rinda rakstrarstuðul til lærlingaundirvísing á høvuðskontu 7.23.3.05. Miðnámsútbúgvingar. Kostnaðurin fyri hvørja tænastu sær er áleið 4,6 mió. kr., og er hetta sostatt útreiðsluneutralt fyri landið og kommunurnar.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 516.885 | 400 | 517.285 |
| 20. Vanligt virksemi | 492.315 | 400 | 492.715 |
| 21. Virksemi uttanlands | 24.570 | - | 24.570 |

## 8.21.7. Sosialar skipanir

**8.21.7.01. Almannatrygd** *(Lógarbundin játtan)*

Nýggjar metingar vísa, at játtanin til undirkontu 01. Fyribils uppihaldsveiting kann verða lækkað við 1 mió. kr.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 152.154 | -1.000 | 151.154 |
| Inntøkujáttan | 436 | - | 436 |
| 01. Fyribils uppihaldsveiting | | | |
| Útreiðslujáttan | 53.874 | -1.000 | 52.874 |
| *Inntøkujáttan* | *436* | - | *436* |
| 02. Varandi uppihaldsveiting | 514 | - | 514 |
| 03. Fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslur | 1.827 | - | 1.827 |
| 06. Stuðul til hjálparráð o.a. | 35.777 | - | 35.777 |
| 07. Uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi | 8.972 | - | 8.972 |
| 08. Móttøkuskylda og tryggjaðar búfyriskipanir | 6.256 | - | 6.256 |
| 09. Hoyritól | 4.500 | - | 4.500 |
| 10. Serligur stuðul | 5.982 | - | 5.982 |
| 11. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku | 26.276 | - | 26.276 |
| 12. Endurgjald fyri meirútreiðslur | 8.176 | - | 8.176 |

## 8.21.8. Sosialar pensjónir

**8.21.8.01. Fólkapensjón** *(Lógarbundin játtan)*

Nýggjar metingar vísa, at játtanin til undirkontu 10. Fólkapensjón kann verða lækkað við 2 mió. kr.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 750.735 | -2.000 | 748.735 |
| 10. Fólkapensjón | 525.009 | -2.000 | 523.009 |
| 15. Pensjónsnýskipanin | 225.726 | - | 225.726 |

**8.21.8.05. Fyritíðarpensjón** *(Lógarbundin játtan)*

Nýggjar metingar vísa, at játtanin til undirkontu 01. Hægsta fyritíðarpensjón kann verða lækkað við 3 mió. kr.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 374.551 | -3.000 | 371.551 |
| 01. Hægsta fyritíðarpensjón | 314.556 | -3.000 | 311.556 |
| 02. Miðal fyritíðarpensjón | 29.243 | - | 29.243 |
| 03. Lægsta fyritíðarpensjón | 21.037 | - | 21.037 |
| 04. Avlamisveiting | 4.506 | - | 4.506 |
| 05. Læknaváttanir | 1.195 | - | 1.195 |
| 06. Framskundað pensjón | 4.014 | - | 4.014 |

# § 13 Uttanríkis- og mentamál

## Felagsútreiðslur

### 13.11.1. Fyrisiting

**13.11.1.59. Uttanríkis- og mentamálaráðið** *(Rakstrarjáttan)*

Í sambandi við broytt málsøkjabýti vórðu nógvar flytingar gjørdar millum nýggju stjórnarráðini. Komið er eftir, at nakrar tillagingar skulu verða gjørdar. Til Uttanríkis- og mentamálaráðið verða samsvarandi fluttar 825 tús. kr. Somuleiðis verða sparingar gjørdar í lønum og umsitingarkostnaði á tilsamans 2,8 mió. kr. Parturin hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum er 645 tús. kr.

Í játtanini eru avsettar 350 tús. kr. til bíbliutýðing. Arbeiðið við bíbliutýðingini er seinkað, og mett verður, at øll játtanin verður ikki brúkt í 2026. Biðið verður um, at 175 tús. kr. verða fluttar til høvuðskontu 13.24.3.22. Listasøvn í sambandi við, at rundskriv um listprýði verður sett í gildi.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 32.009 | 5 | 32.014 |

## Uttanríkismál

### 13.13.3. Menningarsamstarv

**13.13.3.03. Neyðhjálp og menningarsamstarv** *(Stuðulsjáttan)*

Sum partur av fíggingini til bátar til Ukraina, høvuðskonta 13.13.3.05., verður biðið um, at játtanin til menningarsamstarv verður lækkað við 2,5 mió. kr. í 2026.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 15.675 | -2.500 | 14.175 |

**13.13.3.05. Bátar til Ukraina** *(Stuðulsjáttan)*

Biðið verður um játtan á 4 mió. kr. Landsstýrið er samt um at bjóða Ukraina tveir skjóttgangandi bátar, sum eru framleiddir í Føroyum.

Samskifti er umvegis donsku verjuna við Ukraina, um ítøkilig viðurskifti viðvíkjandi bátunum, t.d. útgerð. Bátarnir kunnu eitt nú nýtast til serdeildir, til sjúkraflutning og annað virksemi hjá ukrainska flotanum.

Samskifti hevur í eina tíð verið við fyritøkuna Brim Boats um at framleiða tveir skjóttgangandi bátar at lata til Ukraina. Brim Boats metir nú, at fyrri báturin kann verða liðugur 10 vikur eftir at bíleggingin er gjørd. Seinni báturin verður klárur at lata 10 til 12 vikur eftir fyrsta bátin.

Umframt ítøkiliga nyttuvirði, sum ukrainski flotin fær burturúr bátunum, metir Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at tað í breiðari uttanríkispolitiskum høpi er eitt týðandi signal at senda umheiminum, at Føroyar, eins og lond flest um okkara leiðir, lata útgerð, ið styrkir evnini hjá Ukraina at verja seg.

**Kostnaðarmeting**

Fyrri báturin verður mettur at kosta millum 1 og 1,1 mió.kr og seinni báturin millum 1,85 og 1,95 mió. kr. Fyrri báturin er ein tillaging av einum báti, ið longu er framleiddur. Seinni báturin hevur meira útgerð enn tann fyrri og kostar tískil meir.

Samskifti er í løtuni um ítøkiliga útgerð, og lagt eigur at verða upp fyri millum 10-15 prosentum í óvissu, umframt rásarúmi fyri at ganga møguligum ynskjum frá Ukraina á møti í sambandi við ætlanina, t.d. eykaútgerð. Væntandi verður upphæddin sostatt útivið 4 mió. kr.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | 4.000 | 4.000 |

# Mentamál

## 13.24.2. Skapandi og útinnandi virksemi

**13.24.2.04. Mentanargrunnurin** *(Stuðulsjáttan)*

Í sambandi við, at ein meirnýtsla í 2025 á undirkontu 02. Listafólkalønir verður kannað, er komið fram til, at játtanin fyri 2026 er ov lág til 3 listafólkalønir. Mett verður, at umleið 300 tús. kr. vanta í. Orsøkin er, at lønin sambært kunngerð fylgir sáttmálanum um læraralønir, sum hækkar á hvørjum ári. Tað er ikki lagt upp fyri lønarframskrivingini árini frammanundan, tí talan er um eina stuðulsjáttan. Í 2026 er lønarframskriving løgd inn, men hon dekkar ikki tað, sum vantar í fyri árini frammanundan og tí lønarvøkstri, sum lagt verður upp fyri, tá ið listafólkalønirnar verða játtaðar fyri 3 ár í senn, og lønirnar til fylgjandi ár verða framskrivaðar og støðlaðar.

Játtanin til undirkontu 01. Mentanargrunnurin er hækkað við 900 tús. kr. í fíggjarlógaruppskotinum. Biðið verður um, at fluttar verða 300 tús. kr. av tí undirkontuni til undirkontu 02. Listafólkalønir.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 14.080 | 0 | 14.080 |
| 01. Mentanargrunnurin | 7.729 | -300 | 7.429 |
| 02. Listafólkalønir | 4.551 | 300 | 4.851 |
| 03. Tjóðskjalasavnið | 800 | - | 800 |
| 04. Føroyskt tilfar til børn og ung | 1.000 | - | 1.000 |

## 13.24.3. Mentanararvur

**13.24.3.12. Tjóðsavnið** *(Løgujáttan)*

Til tess at halda løgukarmin á áleið sama stigi sum í fíggjarlógaruppskotinum verður biðið um, at játtanin til goymslubygning hjá Tjóðsavninum verður lækkað við 4 mió. kr. í 2026.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 30.000 | -4.000 | 26.000 |

**13.24.3.22. Listasøvn** *(Rakstrarjáttan)*

Landsstýrið hevur samtykt at seta rundskriv um listprýði í gildi frá 1. juli 2026. Listprýðing av bygningum landsins er við til at skapa góðar karmar um trivnað, heilsu, arbeiði og læring hjá teimum, ið brúka bygningin. Endamálið við rundskrivinum er at skipa listprýðing í byggiverkætlanum landsins, so at listprýðing og byggilist verður hugsað sum ein heild, og at ein partur av byggikostnaðinum verður settur av til list frá byrjan av verkætlanini. Eisini er endamálið at skipa ráðgeving á økinum eins og umvæling og viðlíkahald av listaprýðingunum.

Umsitingin av skipanini verður løgd til Listasavn Føroya. Í 2026 verður kostnaðurin 175 tús. kr. til starvsfólk, skrivstovuhald og skrásetingarskipan, men í 2027 verður neyðugt at framskriva játtanina til fult virksemi, íalt 350 tús. kr.

Biðið verður samstundis um, at fíggjarlógarteksturin verður rættaður samsvarandi, so teksturin endar við: ”Játtanin er í 2026 hækkað við 175 tús. kr. til umsiting av rundskrivi um listprýði. Játtanin er sett av til starvsfólkaútreiðslur, skrivstovuhald og eina skrásetingarskipan.”

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 6.446 | 175 | 6.621 |
| 20. Listasavn Føroya | 6.446 | 175 | 6.621 |

# Handil og vinna annars

## 13.37.2. Ymiskur studningur

**13.37.2.16. Kolagrevstur** *(Stuðulsjáttan)*

Landsstýrið er samt um, at játtanin til kolagrevstur er til at varðveita siðaarv og er semja um, at játtanin í síni heild skal flytast frá vinnumálum til mentamál.
Játtanin verður tí flutt frá § 6 Tilfeingis- og vinnumál.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | 700 | 700 |

## 13.37.4. Ognarskrásetingar

**13.37.4.09. Landsstreymsverkætlanir, løgustuðul** *(Stuðulsjáttan)*

Til tess at halda løgukarmin á áleið sama stigi sum í fíggjarlógaruppskotinum verður biðið um, at játtanin til landsstreymsverkætlanir verður lækkað við 1 mió. kr. í 2026.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 4.000 | -1.000 | 3.000 |

# § 56 Serinntøkur, vinnumál

## Landbúnaður

### 56.33.2. Landbúnaðarstudningur

**56.33.2.12. Niðurlaðing av Búnaðargrunninum** *(Stuðulsjáttan)*

Sambært løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 90 frá 7. mai 2025 § 10c stk 1-3 verða 10 mió. kr. av fæi grunnsins settar á serstaka kontu, ætlað til stuðul at menna og gagnnýta landbúnaðarframleiðslu. Upphæddin verður flutt úr grunninum við 2 mió. kr. um árið í fimm ár á høvuðskontu 6.33.2.10. Landbúnaðarstuðul, undirkonta 11. Grønmetisframleiðsla. Hesin stuðul verður latin samsvarandi ásetingunum í løgtingslóg um landbúnaðarstuðul.

| Tús. kr. | U | BU | U+BU |
|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | - | 2.000 | 2.000 |